# Hvalbingar átala Føroya Banka harðliga

**Bygdaráðið mótmælir at Føroya Banki skerjir avgreiðslutíðina á deildini í Hvalba úr 22 tímum um vikuna, niður í seks**

BANKAVIRKSEMI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Peningastovnarnir repa seglini og hetta hevur ført til at fleiri deildir á smáum og miðalstórum eru lætnar aftur, ella at avgreiðslutíðin er skerd.

Og nú er so tørnið komið til Føroya Banka í Hvalba.

Føroya Banki hevur í hesum døgum sent skriv runt í Hvalba og í Sandvík, har boðað verður frá, at avgreiðslutíðin á bankadeildini í Hvalba verður skerd.

Í løtuni er Føroya Banki í Hvalba opin hvønn dag frá klokkan 12-16, men hósdag er opið til klokkan 18. Sostatt er bankin í Hvalba opin 22 tímar um vikuna.

Men hereftir verður bankin í Hvalba bara opin annanhvønn dag, mánadag, mikudag og fríggjadag, frá klokkan 14-16. Sostatt verður hann bara opin í seks tímar um vikuna hereftir, ella18 tímar færri enn nú.

Hetta hevði bygdaráðið í Hvalba til umrøðu á fundi hóskvøldið og bygdaráðið var samt um at átala framferðina hjá Føroya Banka harðliga. Bygdaráðið átalar harðliga, at avgreiðslutíðin á deildini í Hvalba er skerd einaferð enn.

Bygdaráðslimir hildu, at tað var ógvuliga hent, at bankin júst var opin í døgverðatímanum, so at fólk, sum vóru til arbeiðis, eisini høvdu møguleika at brúka bankan. Tað fáa tey ikki, nú bankin bara er opin annanhvønn dag frá klokkan 14-16.

# Nú fáa vágbingar at vita hvar teir búgva

**Nú verður seinasta hond løgd á arbeiðið at geva øllum vegum í Vági nøvn og øllum húsum, nummar**

GØTUNØVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tíðliga í vár fáa allir vágbingar at vita, hvar teir búgva.

Nú verður seinasta hond lagt og eitt drúgvt arbeiði at geva øllum gøtum og vegum í Vági navn og tíðliga í vár skuldi alt verið liðugt.

Á seinasta býráðsfundinum í fjør, samtykti býráðið endaliga, hvussu vegirnir í Vági skulu nevnast.

Tilsamans eru tað einir 50 vegir og gøtur í Vági, sum nú hava fingið navn.

Nú skulu øll nøvnini sendast til serkøn í føroyskum máli til rættlestur og síðani skal fyritøkan Munin, gera eitt fullfíggjað kort yvir Vág við øllum nøvnunum á.

Samstundis eru húsanummur gjørd til hvørt hús, sum eisini verða klár at seta uppá húsini, táið alt er liðugt.



*Nú hava einir 50 vegir í Vági fingið nøvn. Tíðliga í vár verða vegaskelti sett upp og hvørt hús fær nummar*

Hetta hevur verið eitt arbeiðið, sum hevur tikið fleiri ár. Upprunaliga varð heitt á vágbingar um at koma við uppskotum um, hvussu umleið 25 vegir og gøtur í Vági skuldi nevnast. Síðani hevur ein gøtunavnanevnd mett um uppskotini og fyri einum ári síðani var almenn móttøka, har nøvnini vórðu løgd fram fyri vágbingum.

Í gøtunavnanevndini sótu Arnfinnur Thomasen, Ebba Skaalum, Torleif Augustinussen og Páll Jacobsen.

Í nevndini varð roynt at taka atlit at gomlu staðarnøvnunum í Vági. Upprunaliga varð eisini ætlanin at nevna vegir og gøtur eftir kendum vágbingum, men tann ætlanin varð slept, tí tað varð ov viðkvæmt við tað, at ávís ónøgd var við, hví onkur varð uppkallaður og onkur annar ikki.

Uppskotini frá navnanevndini eru yvirhøvur nógv broytt, nú tað endaliga er staðfest, hvussu vegirnir skulu nevnast.

Og vegnanøvn, sum vágbingar nú skulu venja seg við, eru Toftavegur, Líðarvegur, Skálavegur, Niðarivegur, Fossavegur, Gjógvaravegur, Hvannadalsbrekka o.s.fr.

Tað er lóg, at allar bygdir skulu hava gøtunøvn og øll hús, nummar.

At ongir vegir hava nøvn og ongi húsanummur eru, hevur mangan elvt til trupulleikar, eitt nú tá ið fremmandir læknar skulu finna vegin fram til sjúklingar.

# Norrøna kastar nógvan pening av sær í Hetlandi

**Í fjør kastaði Norrøna 50-55 milliónir av sær til Hetlendska búskapin, sigur formaðurin í hetlendska íleggingargrunninum**

NORRØNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Íløgurnar, sum hetlendingar hava gjørt í Nørruna, hava loyst seg væl.

Tað staðfestir formaðurin í hetlendska íleggingargrunninum, Gussie Angus, í Shetland News nú um ársskiftið.

Hetlendski íleggingargrunnurin hevur sett 50 milliónir í Norrønu og ætlar at seta góðar 30 milliónir afturat í Smyril Line.

Men eisini í Hetlandi hava íløgurnar í Norrønu verið umstríddar, men nú vísa seinastu tølini altso, at tær hava loyst seg væl.

Bara í fjør kastaði Norrøna einar 50-55 milliónir av sær í hetlendska samfelagnum, sigur hann.

Hann sigur, at beinleiðis virksemið hjá Norrønu hevur sprænt 18-20 milliónir inn í hetlendska búskapin, men harafturat hevur tað avleidda virksemið kastað aðrar 32-35 milliónir av sær til hetlendska samfelagsbúskapin.




*Norrøna er gull verd fyri hetlendska búskapin, staðfesta nýggjar útrokningar*

– Men tá er ikki lagt upp fyri teirri menning, sum teir nýggju handilsmøguleikarnar, ið ferðasambandi hjá Norrønu førir við sær, leggur hann afturat.

Hann sigur eisini, at íløgan hjá hetlendska íleggingargrunninum, gevur hetlendingum ein nevndarlim í Smyril Line og verulig ávirkan á raksturin hjá felagnum.

Sambært Shetland News eru tað óheftir serfrøðingar, sum hava roknað hetta út. Tað eru AB Associates, í Scalloway, sum hava gjørt útrokningarnar.